# Ólavur taldist m



*Eli Smith hevur lagt minnis framsýningina til rættis, og saman við øðrum hevur hann skipað fyri fløguútgávuni til minnis um Ólav á Váli*

**Men hann helt lítið um síni egnu evni, og tað var neyðugt at skumpa undir hann fyri at fáa hann at sýna tekningarnar fram. Sangin sá hann sum andaliga uppgávu, ið hann hevði byrðu fyri at bera fram, heldur vinmaðurin, listarligi felagin og svágurin Eli Smith**

ÓLAVUR Á VÁLI 50 ÁRA MINNISFRAMSÝNING OG FLØGA

*Orð: Jóannes Hansen*
*Tekningar: Ólavur á Váli (úr heftinum sum fylgir við nýggju fløgunum)*

Ólavur á Váli taldist millum størstu føroysku sangararnar. Tað er eingin ivi um tað. Einarøddin og bassrøddin í kórum og bólkum var framúr, og øll tey, sum sungu saman við honum í Ebenezerkórinum, Kamarkórinum og øllum øðrum kórum, sum hann stuðlaði eitt nú á uttanlandsferðum, eiga at taka undir við, at tann, sum stóð undir liðini á honum ella var bassur saman við Ólavi, kendi seg lyftan upp. Hansara rødd so at siga fylti rúmið, og uttan at hann á nakran hátt ynskti at gera nakran sum helst háva burturúr sær sjálvum, so var hann í miðdeplinum, tá ið tað um sang og kór ráddi.

– Hann var eitt náttúrtalent. Tað var hann í sanginum, og tað var hann so sanniligi eisini í at tekna.

Tað er Eli Smith, sum vit tosa við. Hann og Ólavur vóru javnaldrar. Eli er giftur Britu, yngru systir Ólavs. Teir høvdu felags áhuga í sangi. Teir sungu saman í kóri og dupult kvartett, og teir høvdu eisini felags áhuga í listini og serliga í at tekna.

– Sum teknari taldist Ólavur millum teir størstu í Føroyum. Vit eiga fleiri góðar teknarar. Í mong ár havi eg sjálvur fingist vil at tekna og mála, og harvið havi eg verið nógv í listarliga umhvørvinum. Og tað hevur aftur og aftur verið staðfest, at millum teirra, sum fáast við at mála og tekna, varð Ólavur mettur at vera sera evnaríkur.

Ólavur á Váli doyði brádliga 19. februar í ár. Á 50 ára føðingardegi hansara, sum er í dag, fríggjadagin 26. august, verður minnisframsýning latin upp í Snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu, og samstundis verður tvífløga útgivin.

Eli Smith hevur staðið fyri at leggja listarframsýningina til rættis, og saman við Jóannesi á Váli, beiggja Ólavs, Maluni Guttesen og Alexander Samuelsen hevur hann tikið stig til og samskipað arbeiðið at fáa fløgurnar útgivnar. Heitið á fløguhúsanum er Lívsins land, og tað er EvR studio, sum er útgevari. Jón Svein Heinesen hevur ljóðviðgjørt og greitt fløgurnar til framleiðslu. Kári Holm Olsen hevur gjørt umslagið, repro og sett upp, Rúna Berghamar, Erla Berghamar Sørensen og Árni av Reyni hava rættlisið, og Tocano í Keypmannahavn hevur framleitt.

Á fløguhúsanum hevur Svenning av Lofti hugleiðingar, sum hann kallar Ólavur - ein savnandi miðdepil. Harafturat eru allir 40 sangtekstirnir prentaðir, og tað er viðmerkt hvør eigur orðini og løgini. Tað verður upplýst í hvørjum sambandi upptøkurnar eru gjørdar, og hvørji tey eru, sum spæla undir.



*Sjálvsmynd, Ólavur á Váli*



*Líggjas á Váli, pápi Ólavs*

### Teknarin

Ólavur á Váli fekst við at tekna frá tí, at hann var smádrongur. Serliga vóru tað persónsmyndirnar, sum hann var kringur í, og eisini fekst hann nógv við at tekna hús og býlingar og landsløg.

– Vit vóru á kunstháskúla saman í Holbæk í fýra mánaðir í 1982. Tá varð tað lagt til merkis, hvussu væl tað lá fyri hjá Ólavi at tekna. Hetta var honum íborið. Hjá mær og øðrum hevur tað verið og er tað neyðugt at arbeiða og venja fyri at koma á lagi, um tú ikki hevur havt blýantin í hondini í eitt langt skifti, og ofta eydnast tað ikki meiri enn passaligt at finna rætta lagið. Ólavur var so at siga altíð í rætta lagnum. Tað lá so ómetaliga væl fyri hjá honum at tekna, og tað var so skjótt, at hann var fokuseraður. Eg havi havt stóra gleði av at læra teknitekníkk av Ólavi. Hann var fínur eygleiðari, og hann dugdi so væl at fata ella liva seg inn í motivið og at fáa tað á pappírið, greiðir Eli Smith frá.

Eli Smith og Ólavur á Váli vóru á mongum ferðum saman fyri at fáa listarligan íblástur. Eitt nú vitjaðu teir í París, Amsterdam og Berlin, hagar leiðin gekk seinastu ferðina, teir vóru suðuri í Europa í listarligum ørindum. Teir høvdu eisini fleiri felags framsýningar í Føroya Sparikassa, í Smiðjuni í Lítluvík og í atelierinum hjá Eli Smith.